Landsbanki Føroya

FAROE ISLANDS
GOVERNMENTAL BANK



# ÁRSFRÁGREIÐING 2019

# INNIHALD

Fíggjarligt støðufesti í hásæti ................................ 1

Nevnd ................................................................... 1

Starvsfólk ............................................................. 1

Landskassin bjálvaður........................................... 1

Íløgurnar kastaðu av sær ...................................... 3

Skuldin minkaði ..................................................... 4

Kredittvirðið vaks ................................................... 4

Hvør brúkar, hvør sparir, hvør lænir?............... 5

Fíggjarviðurskifti Landsbankans......................... 5

Føroya Váðaráð og systemiskir váðar ................ 6

Framtíðarútlit ......................................................... 6

## Fíggjarligt støðufesti í hásæti

Landsbankin virkar fyri fíggjarligum støðufesti og er fíggjarstovnur hjá landinum. Uppgáva landsbankans er at eygleiða og greina fíggjar-geiran og búskapin sum heild, og gera vart við fíggjarligar váðar, tá ið hesir stinga seg upp.

Landsbankin hevur fýra høvuðsendamál:

1) Virkar fyri fíggjarligum støðufesti í Føroyum
2) Røkir gjaldførið hjá landinum
3) Røkir skuldina hjá landinum
4) Kunnar politisku skipanina og almenningin

Harafturat er Landsbankin skrivstova hjá Føroya Váðaráði, sum heldur eyga við, og eyð-merkir systemiskar fíggjarligar váðar, um slík-ir taka seg upp. Eisini umsitur landsbankin Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og Bú-skapargrunnin.

**Nevnd**
Sjey fólk sita í nevndini. Nevndarlimirnir verða valdir fyri trý ára tíðarskeið og kunnu í mesta lagi veljast fýra ferðir. Nevndarlimir skulu hava fakligar førleikar innan eitt ella fleiri av førleikaøkjunum: búskaparfrøði, fígging og kredittmeting og serligt innlit í føroyska fíggjargeiran ella búskapin í Føroyum.

Av teimum sjey nevndarlimunum tilnevnir landsstýrismaðurin í fíggjarmálum tveir, Fróð-skaparsetur Føroya tilnevnir tveir, Føroya Arbeiðsgevarafelag tilnevnir ein, Fakfeløgini tilnevna ein, og Kommunufelagið tilnevnir ein.

Nevndarlimirnir eru:

- Tummas T. Eliasen, formaður
- Jan Otto S. Holm, næstformaður
- Zvonko Mrdalo
- Elisabeth Eldevig
- Fróði Magnussen
- Mathea Hilduberg
- Edvard Heen

Nevndin hevur havt sjey fundir í 2019. Á hvør-jum fundi verður hugt og fylgt við gjaldføri, avkasti og skuld hjá landskassanum. Nevndin hevur eisini javnan umrøtt eftirlit við áseting-um í lóggávu og kørmum – eitt nú eftirlit við minstagjaldførinum og íløgukørmunum. Nevndin viðger eisini altíð samfelagsgongdina og viðkomandi búskaparlig mál.

**Starvsfólk**
Starvsøkið hjá landsbankanum kann býtast í tvey høvuðsøki: ein bankapart og ein greining-arpart. Bankaparturin arbeiðir við láni, skuld og gjaldføri hjá landskassanum, meðan greiningarparturin framleiðir, savnar saman, greinar hagtøl um føroyska fíggjargeiran og kunnar um týdningarmestu viðurskiftini, ið síggjast í hagtølunum.

Landsbankin hevur sjey starvsfólk umframt stjóran. Stovnurin er lítil, og hóast tvey høvuðs-øki, arbeiða øll saman um fleiri uppgávur. Um-framt føstu starvsfólkini, brúkar Landsbankin eisini ráðgevar til avmarkaðar uppgávur, eitt nú greiningar og kunningartøkni.

## Landskassin bjálvaður

Lógin um Landsbanka Føroya staðfestir, at landskassin skal hava 15 prosent av BTÚ í minstagjaldføri. Ásetingin kom beint eftir kreppuna í 90 árunum fyri at tryggja, at lands-kassin í kreppustøðum hevur tøkan pening at rinda lønir, pensjónir og aðrar útreiðslur við. Tiltaksgjaldførið er nóg stórt at rinda skyld-urnar í seks mánaðar, hóast landskassin ongar inntøkur hevur.

Í 2019 skuldi landskassin soleiðis hava í minsta lagi 2,83 mia. kr. í gjaldføri. Stórur partur av hesum peningi er settur í virðisbrøv uttan-lands. Landsbankin leggur eina gjaldføris-ætlan, soleiðis at landskassin fær eitt hóskandi avkast, tó við atliti til váðan. Meginparturin verður settur í stats- og realkredittlánsbrøv (2,2 mia. í miðal), í altjóða partabrøv (545 mió. kr. í miðal) og nakað í kredittlánsbrøv (328 mió. kr í

miðal). Íløguheimildin hjá Landsbankanum liggur á heimasíðuni www.landsbankin.fo.[1]

Landsbankin veitir íløgurøktina út til fimm ymiskar norðurlendskar íløgurøktarar. Landsbankin umsitur eisini sjálvur eina íløgurøð við stats- og realkredittlánsbrøvum – hetta fyri at fáa neyðuga smidleikan í gjaldførið til raksturin hjá landinum. Ein lítil partur av gjaldførinum er eisini settur í alternativar íløgur, eitt nú í undirstøðukervi og mikrolán (í miðal 119 mió. kr.).

takast út at rinda lønir, pensjónir v.m. um á stendur.

Í tílíkum føri verða føroysku peningastovnarnir heldur ikki órógvaðir av, at landið tekur nógvar pengar út, tí peningurin stendur ikki á bók hjá teimum. Henda gjaldførisætlan er sostatt grundleggjandi fyri fíggjarliga støðufestið.

Mynd 1 vísir gongdina í gjaldførinum hjá landskassanum í 2019. Eisini sæst miðal gjaldførið fyri alt árið og minstagjaldførið (kravið á




*Mynd 1 – Gjaldføri hjá landskassanum í 2019*

Av gjaldførinum hjá landskassanum liggja í miðal eini 170 mió. kr. í Føroyum – hetta er neyðuga upphæddin til dagliga raksturin. Restin er sett uttanlands fyri at spjaða váðan. Koma føroysku peningastovnarnir í kreppu, er ikki gott, um landið hevur allar pengarnar í føroyskum peningastovnum, tí so er vandi fyri, at landið ger kreppuna verri. Tí stendur peningurin uttanlands og kann í eini handavending

15 prosent í gjaldføri av BTÚ). Sum myndin vísir er miðalupphæddin (reyð linja) væl omanfyri minstagjaldførið (blá linja). Miðalupphæddin er 3,33 mia. kr. Leggjast kann til merkis, at gjaldførið minkaði við 800 mió. kr. miðjan juni, tá landskassin rindaði skuld niður við 800 mió. kr.

[1] Gamalt er, at øll egg ikki mugu leggjast í somu kurv. Soleiðis er eisini við virðisbrøvum – at best er at seta pengar í fleiri enn eitt slag av virðisbrævi. Ein íløgurøð er tí ofta sett saman við ymiskum sløgum av lánsbrøvum (obligatiónum) og partabrøvum. Samansetingin hevur týdning, tí oftast gongur væl við partabrøvum, tá ið illa gongur við lánsbrøvum, og øvugt. Á fakmálið eitur tað at samvariatiónin er negativ, ið merkir at tá tað eina gongur væl gongur hitt illa. Soleiðis verður váðin meira spjaddur.

## Íløgurnar kastaðu av sær

Talva 1 vísir árliga virðisbrævaavkastið hjá landskassanum síðani 2015. Avkastið var gott í 2016, 2017 og 2019. Lítið avkast var í 2015 og 2018 var fyrsta árið við negativum avkasti, síðani Landsbankin (Gjaldstovan 2013-2017) fór undir hetta virksemi. Her er týdningarmikið at vísa á, at virðisbrævakursir (partabrøv, lánsbrøv, kredittlánsbrøv v.m.) sveiggja hvønn dag. Hækkar kursurin, fær landskassin meira fyri virðisbrævið, um tað verður selt. Minkar kursurin, fær landskassin minni.

Talva 1 vísir avkastið av íløgurøktini fyri hvørt ár. Men fyri at meta um, hvørt ein íløgustrategi er góð, er rættari at hyggja at miðalavkastinum í einum fimm ára tíðarskeiði. Síðani 2015 hevur miðalavkastið verið 2,42 prosent ella 67 mió. kr. um árið.

| | Avkast % | Avkast mió. kr. |
|---|---|---|
| 2015 | 0,53 | 11 |
| 2016 | 3,88 | 86 |
| 2017 | 2,81 | 82 |
| 2018 | -1,40 | -36 |
| 2019 | 6,30 | 191 |
| **Miðal 15-19** | **2,42** | **67** |

*Talva 1 – Avkast av gjaldføri hjá landskassanum síðan 2015*

Avkastið av íløgurøktini kann sveiggja frá einum ári til annað, og serliga var hetta sjónligt í 2018. Tapið í 2018 varð tó longu vunnið inn aftur í januar 2019 og í 2019 góvu nærum øll sløg av virðisbrøvum positivt avkast og var samlaða avkastið heili 6,3% (Talva 2).

Endaliga avkastið í 2019 er tó merkt av, at 800 mió. kr. hava staðið í stuttum realkredittlánsbrøvum í 2019. Hesin peningurin skuldi brúkast til at rinda skuld við í juni 2019, og tí kundi hann ikki setast í long lánsbrøv. Stutt lánsbrøv geva negativt avkast.

Í 2019 hevur fíggjarmarknaðurin verið merktur av ivamálum, eitt nú um Bretland skuldi úr ES við ella uttan eina avtalu. Handilsstríðið millum Kina og USA merkti eisini marknaðin. Lagaligi pengapolitikkurin hjá miðbankum hevur elvt til lágt avkast av lánsbrøvum, men hevur hinvegin havt størri eftirspurning og harvið eisini høgan kurs á partabrøvum við sær.

Í Talva 2 sæst avkastið av ymsu virðisbrøvunum, sum Landsbankin hevur gjørt íløgur í. Størsta avkastið er komið av íløgum í partabrøv, meðan tey minnu váðafúsu virðisbrøvini, til dømis statslánsbrøv, hava givið lægri avkast.

| | Miðal íløga mió. kr. | Avkast mió kr. | Avkast % | Býtið % |
|---|---|---|---|---|
| Partabrøv | 505,6 | 147,8 | 29,23 | 16,7 |
| Statslánsbrøv | 50,6 | 1,0 | 1,90 | 1,7 |
| Realkredittlánsbrøv | 1.968,4 | 4,9 | 0,25 | 65,1 |
| Kredittlánsbrøv IG | 85,9 | 6,7 | 7,76 | 2,8 |
| Hárentulánsbrøv | 216,2 | 23,0 | 10,65 | 7,1 |
| Alternativar íløgur | 109,9 | 7,6 | 6,92 | 3,6 |
| Onnur fíggjaraktiv | 88,9 | -0,5 | -0,53 | 2,9 |
| **Íløgur tilsamans** | **3.025,5** | **190,5** | **6,30** | **100,0** |

*Talva 2 – Avkast av íløgurøðini hjá landskassanum (uttan grunnar) í 2019, býtt á virðisbrævasløg.*[2]

Pengar, sum landskassin hevur standandi á bók í Føroyum, hevur givið negativt avkast av tí at føroyskir peningastovnar, eins og útlendskir peningastovnar, hava givið negativa rentu í 2019 fyri innistandandi. Hesin peningur verður brúktur til dagliga raksturin hjá landinum.

Um so var, at landið noyddist at nýta gjaldførið til at rinda m.a. almennar veitingar og lønir við, hevði tað órógvað fíggjarliga støðufestið um allur peningurin stóð á bók Føroyum og við einum varð tikin úr peningastovnunum.

[2] Pengar, sum landskassin hevur standandi á bók í Føroyum, verða brúktir til dagliga raksturin hjá landinum. Hesir eru ikki við í Talva 2.

Landskassin kann tí sambært reglugerð í mesta lagið hava 200 mió. kr. innistandandi í føroyskum peningastovnum.

Íløgurrøktin varð boðin út í 2018 fyri bæði landskassan og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin (AMEG), sum Landsbankin umsitur. Fimm norðurlendskir peningastovnar hava fingið uppgávuna at røkja stóran part av íløgunum hjá landskassanum. Hesir eru Nordea, SEB, Handelsbanken, Nykredit og ein minni íløgurøð til Sydbank. Avtalurnar vóru galdandi frá 1. januar 2019.

## Skuldin minkaði

Lánsbrævaskuldin hjá landskassanum var við árslok 2019 3,7 mia. kr. tilsamans. Skuldin hjá landskassanum er sett saman við fýra lánsbrævarøðum. Tvey av hesum eru 5-ára lán, eitt er 6-ára lán og eitt er 15-ára lán. Øll lán eru standandi – tað vil siga, at bara renta (og ikki avdráttur) verður goldin í lánitíðini. Láneupphæddin verður goldin aftur í einum, tá ið lánitíðin er av.

Mynd 2 vísir miðalrentuna við ársenda, sum landskassin rindar av hesum fýra lánsbrævarøðum. Í 2019 rindaði landskassin í miðal 0,86 prosent í rentu av sínum lánum, sum við ársenda vóru 3,7 mia. kr.




*Mynd 2 – Lánsbrævaskuld: Miðal renta ultimo ár*

Rentan sum Føroyar rinda í sambandi við lántøku er nógv minkað seinastu 9 árini. Í 2011 var rentan á lánsbrævaskuldini í miðal 3,04%. Um rentan var á sama støði sum í 2011, høvdu rentuútreiðslurnar hjá landskassanum verið 80 mió. kr. hægri fyri núverandi skuld á 3,7 mia. kr.

Vanliga endurfíggjar/tekur landskassin lán á hvørjum ári. Eitt lán hjá landskassanum fall til gjaldingar í juni 2019. Lánið var á 1,1 mia. kr., og sum Mynd 1 á síðu 2 vísir, var gjaldførið hjá landskassanum væl omanfyri kravið (minstagjaldførið). Tí var ikki neyðugt at endurfíggja alla upphæddina. Landskassin rindaði 800 mió. kr. niður av síni skuld við at brúka av gjaldførinum og endurfíggjaði 300 mió. kr. Renta á endurfíggingini var -0,3575. Lántøkan var gjørd við at hækkað lánið sum fellur til gjaldingar í juni 2020. Hetta er fyrstu ferð, at landskassin lænir við negativari rentu. Gjaldføri landskassans minkaði sostatt við 800 mió. kr. í juni 2019 (sí Mynd 1). Næsta lán hjá landskassanum fellur til gjaldingar í juni 2020. Lánið er 1,345 mia. kr.

## Kredittvirðið vaks

Ratingstovnurin Moody’s kreddittmetir Føroyar. Seinasta kredittmetingin er frá juni 2019. Kredittmetingin hækkaði eitt stig úr Aa3 til Aa2 við støðugum útlitum, sum er triðhægsta rating av 21 møguligum. Høvuðsorsøkirnar til betraða kredittvirðið er, at bygningsváðin hjá landinum í sambandi við Eysturoyartunnilin minkaði munandi, tá seinasta skotið var latið í juni mánað. Harafturat vóru fíggjarligu og búskaparligu lyklatølini fyri Føroyar betri, enn roknað hevði verið við frammanundan.

Fyri at víðka um íleggjaraskaran er ein rating neyðug, og jú betri kredittmeting, jú betri er rentan, tá ið landið skal taka lán. Kredittmetingin hjá landskassanum kann eisini brúkast sum útgangsstøði, tá ið fyritøkur og stovnar í Føroyum skulu taka lán í útlondunum.

Moody’s vitjar Føroyar eina ferð um árið – seinast í juni 2019 og næsta vitjanin verður í juni 2020. Allar frágreiðingarnar hjá Moody’s um Føroyar liggja á heimasíðuni hjá Landsbankanum.

## Hvør brúkar, hvør sparir, hvør lænir?

Ein av høvuðsuppgávunum hjá Landsbankanum er at hyggja nágreiniliga at, hvussu nógvir pengar eru ymsastaðni í samfelagnum, eitt nú í bankum, hjá húsarhaldum og hjá fyritøkum. Eisini verður hugt at, hvussu kapitalur ferðast, hvør eigur til góðar, hvør skyldar, javnvág millum skuld og ogn og mangt annað.

Í 2019 gjørdi Landsbankin frágreiðing um gongdina í bankageiranum, sum lýsir fíggjarliga støðufestið í Føroyum við støði í hagtølum um innlán, útlán og innlánsyvirskot og annað. Henda frágreiðing um fíggjarliga støðufestið verður dagførd í næstum. Harafturat kemur ein frágreiðing um ogn og skuld hjá føroyskum húsarhaldum. Landsbankin gjørdi í 2019 eina greining av kapitalkrøvunum til føroysku bankarnar í samstarv við danska váðaráðið. Kunning um greiningarvirksemið hjá Landsbankanum er at finna á www.landsbankin.fo.

Nógv orka er sett av til at fáa neyðug hagtøl til vega, sum kunnu brúkast til viðkomandi greiningar. Fyrst skal Landsbankin fáa tølini til vega frá øðrum stovnum. Landsbankin tryggjar síðani at tølini eru røtt, og reinsar upplýsingarnar, soleiðis, at tær eru sambæriligar. Serliga er tørvur á fíggjarhagtølum, sum kunnu lýsa fíggjarstøðuna hjá húsarhaldum, fyritøkum, og mótvegis útlandinum, ið enn ikki eru at finna hjá Hagstovuni.

Fyri at taka saman um hevur Landsbankin í 2019 millum annað víst á:

- At innlánsyvirskotið hjá húsarhaldum í føroyskum peningastovnum hevur verið vaksandi síðani 2013. Tað vil siga, at húsarhaldini hava sett fleiri pengar inn á bók, enn tey hava tikið í láni í føroyskum bankum. Telist lántøka í donskum realkredittstovnum við, hava húsarhaldini eitt innlánsyvirskot, ið er beint omanfyri 0 kr.
- At almenna bruttoskuldin í Føroyum er lág samanborið við onnur lond, og at tað er týdningarmikið at føroyski búskapurin ikki er líka skuldarbundin, sum størri lond, tí hann er ein lítil og viðbrekin búskapur.
- At útlánini hjá føroysku peningastovnunum hava verið støðugt vaksandi síðani 2014, millum annað vegna stórt íløguvirksemi hjá kommunum og almennum fyritøkum. Í 2019 kom tó vend í. Útlánsvøksturin minkaði og var við ársenda 0%.
- At neyðugt er at hava vakið eyga við útlánsvøkstrinum, av tí at stórur útlánsvøkstur kom undan bæði kreppuni í 90'unum og fíggjarkreppuni í 2008.
- Hvussu nógv samlaðu útlánini hjá peningastovnum telja í prosent av BTÚ síðani 1980. Hetta er eitt av fleiri indikatorum, ið kunnu lýsa fíggjarliga støðufestið.

## Fíggjarviðurskifti Landsbankans

Landsbankin hevur nettojáttan á fíggjarlógini. Á inntøkusíðuni er játtanin 0,4 prosent av minstagjaldførinum. Tað svarar til 11,3 mió. kr. í 2019. Harafturat hevur Landsbankin inntøku av at umsita Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og somuleiðis eina lítla inntøku av at umsita ogn hjá almennum grunnum. Tilsamans gav hetta eina inntøku á 2,1 mió. kr. í 2019. Samlaðu inntøkurnar eru 13,4 mió. kr.

Samlaðu útreiðlsurnar hjá Landsbankanum vóru 8,3 mió. kr. í 2019, har av lønir vóru 5,9 mió. kr., keyp av vørum og tænastum var 1,7 mió. kr. og 0,6 mió. kr. fóru til húsaleigu og keyp av útbúnaði. Keyp av vørum og tænastum er á sama støði sum í 2018, sum í stóran mun er útreiðslur fyri KT, virðisbrævabókhald og aðra sakkøna hjálp, íroknað útreiðslur til Moody's.

Størsta útreiðslan hjá Landsbankanum er til lønir. Tað hevur í samband við menning av greiningarvirksemi bankans verið tørvur á at seta starvsfólk og harvið økja um

lønarútreiðslurnar. Í 2019 er ein hækking á 1,2 mió. kr. samanborið við 2018Í 2018 var eitt starvsfólk sett afturat, sum fær fulla ársløn í 2019. Harafturat var enn eitt fulltíðarstarv sett í 2019, umframt at eitt samskiftisfólk var í landsbankanum í eitt hálvt ár.

## Føroya Váðaráð og systemiskir váðar

Føroya Váðaráð hevur fýra fundir árliga og hevði seinasta fundin í november 2019. Váðaráðið hevur til uppgávu, eins og Landsbankin – við støðið í greiningum – at eyðmerkja váðar. Meðan Landsbankin hyggur yvirskipað at váðum, hyggur Váðaráðið eftir *systemiskum* váðum. At ein váði er systemiskur merkir, at talan er um ein veikleika ella eina ójavnvág í sjálvari fíggjarskipanini, sum økir um vandan fyri, at ein fíggjarkreppa kann taka seg upp. Tað vil siga, at váðin ikki bert er galdandi fyri ein peningastovn, men allar peningastovnar og harvið alt fíggjarkervið.

Í 2019 hevur Føroya Váðaráð harumframt gjørt eina greining av kapitalkrøvunum til føroysku bankarnar í samstarvi við danska váðaráðið, har markvirðini, sum gera av, nær ein banki er SIFI-banki, eisini eru umrødd. Danska váðaráðið – Det Systemiske Risikoråd – almannakunngjørdi greiningina í fyrsta ársfjórðingi 2020, og hon sæst á www.landsbankin.fo.

Føroya Váðaráð er skipað við 5 limum, sum eru valdir í fýra ár í senn. Løgmaður velur limir og varalimir í ráðið eftir tilmælum frá myndugleikum, ið virka fyri fíggjarligum støðufesti í Føroyum. Limir í Føroya Váðaráðið eru:

- Malan Johansen, landsbankastjóri, forkvinna
- Jesper Rangvid, professari, CBS
- Bjørn R. Gudmundsson, skrivstovustjóri, Hagstofa Íslands
- Jógvan Thomsen, stjóri Vinnustovnurin
- Bjarni Askham Bjarnason, aðalstjóri, Fíggjarmálaráðið.

Váðaráðið sendir út tíðindaskriv eftir hvønn fund, sum greiðir frá umrøddu evnunum. Tíðindaskrivini liggja á heimasíðuni www.landsbankin.fo.

Váðaráðið vísti í 2019 millum annað á:

- At útlán til kommunur og almennar fyritøkur eru vaksandi. Hóast útlán til almennar myndugleikar hava minni váða við sær fyri bankarnar, enn útlán til privatu vinnuna, eigur førdi makrobúskaparligi politikkurin at leggja upp fyri, at búskaparliga gongdin kann venda.
- At útlánini ikki eri vaksin skjótari enn búskapurin í 2019, og tað sum heild ikki eru greið tekin um at systemiskir váðar eru í umbúna í føroyska bankageiranum.
- At sethúsaprísirnir framhaldandi eru vaksandi og ansast skal eftir at vøksturin ikki heldur fram ótálmaður, serliga í miðstaðarøkinum.
- At eftirspurningurin hjá føroyskum húsarhaldum eftir donskum realkredittlánum til sethúsafígging er økt og at føroysk húsarhald í størri mun velja lán við fastari rentu heldur enn broytiligari rentu, og at lán við avdráttarskáa eru minkandi.

## Framtíðarútlit

Árið byrjaði við somu góðu útlitum, sum 2019 endaði við. Marknaðirnir vóru jaligir og váðafýsni var framvegis til staðar. Bæði partabrøv og lánsbrøv góðu fitt av avkasti til avleiðingarnar av korona smittuni rakti marknaðin í februar.

Síðani tá eru samfelagsbúskaparligu fortreytirnar broyttar grundleggjandi. Partabrøvini eru fallin nógv í virði og eisini renturnar eru hækkaðar. Síðstu dagarnir í mars vendi gongdin nakað, men fíggjarmarknaðurin sveiggjar nógv alla tíðina, og enn er nakað eftir at røkka sama støðið sum við ársbyrjan.

Koronasmittan er ein stoytur fyri allan heimsbúskapin og vit kunnu rokna við niðurgongd í BTÚ um allan heim fyri 2020, eisini í Føroyum.

Hyggja vit at føroyska búskapinum, kemur hann frá einum hákonjunkturi og er soleiðis lutfalsliga væl fyri at taka ímóti einum bakkasti. Búskapurin er sum heild væl fyri, bæði tað almenna og tað privata. Harafturat er nettoskuld landskassans lítil, sum gevur landskassanum nakað av rásarúmi.

Kvíggjartún 1 ▪ Postsmoga 229 ▪ 165 Argir

+298 360600 ▪ landsbankin@landsbankin.fo